## FØÐINGAR

15. mars fingu Anja Haraldsen og John Gudmundsen, Sørvági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3750 gr.

20. mars fingu Mildrid Einarsdóttir og Hanus Hansen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3950 gr.

21. mars fingu Sunfríð Simonsen og Rúni Ove Vang Poulsen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2955 gr.

22. mars fingu Lena Poulsen og Petur Andersen, Reykjavík, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 3165 gr.

22. mars fingu Maja og Tummas Henriksen, Sørvági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3550 gr.

23. mars fingu Sonja Petersen og Jónfinn Petursson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3550 gr. Stóribeiggin eitur Andru-Emil.

24. mars fingu Alma og Frank Erik Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 3050 gr.

## ANDLÁT

**20. mars**
Inga Falkvard Danberg, Tórshavn, 32 ár.

**21. mars**
Emma Fugloy Jacobsen, Klaksvík, 84 ár.
Hansina Olsen, Hvalvík, 84 ár.

**22. mars**
Tyra Olsen, Tórshavn, 74 ár.

**23. mars**
Hans Erik Olsen, Klaksvík, 60 ár.

**24. mars**
Svávar Andreasen, Skála, 78 ár.
Hans Nybo, ættaður úr Hesti, búsitandi í Havn, 82 ár.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Skírisdag 28. mars: Sverri Lamhauge, tlf. 448016
Langafríggjadag 29. mars, leygardagin 30. mars og páskadag 31. mars: Georg Egholm, tlf. 448016
2. páskadag 1. apríl: Andreas Petersen, tlf. 441086

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

## TILTØK

**Gudstænastur**

Skírisdag:
Vesturkirkjan: Heri Joensen kl. 11, altargongd
Argja kirkja: Bergur D. Joensen kl. 11, altargongd
Porkeri: M. Telling kl. 12
Vágur: M. Telling kl. 18
Christianskirkjan: Hans Eiler Hammer kl. 11, altargongd
Kunoy: Niels Pauli Danielsen kl. 12, altargongd
Sambýlið í Klaksvík: Niels Pauli Danielsen kl. 19.30
Havnar kirkja: Sonja Klein kl. 11, skriftamál kl. 10.40
Havnar kirkja: Bjarni Bæk kl. 18, altargongd
Gøta: Martin R. Jacobsen kl. 12, altargongd
Fríðrikskirkjan: Martin R. Jacobsen kl. 17, altargongd
Dalur: Jákup R. Hansen kl. 12, altargongd
Leirvík: Uni Næs kl. 12, altargongd
Fuglafjørður: Uni Næs kl. 18, altargongd
Gjógv: Emil Olsen kl. 12, messa
Funningur: Emil Olsen kl. 17, messa
Viðareiði: Elsa Funding kl. 12, altargongd
Hvannasund: Elsa Funding kl. 17, altargongd
Skála: Jógvan Fríðriksson kl. 11, altargongd. Talvan gongur fyri Guds orðs boðan
Sjóvar kirkja: Jógvan Fríðriksson kl. 17, altargongd. Talvan gongur fyri Guds orðs boðan
Sandavágur: David Johannesen kl. 12, altargongd
Søldarfjørður: Meinhard Bjartalíð kl. 11, altargongd
Rituvík: Meinhard Bjartalíð kl. 17, altargongd
Fámjin: Jónsvein Bech kl. 12, altargongd
Tvøroyri: Jónsvein Bech kl. 18, altargongd

Langa fríggjadag
Vesturkirkjan: Bergur D. Joensen kl. 11
Argja kirkja: Heri Joensen kl. 11
Vágur: M. Telling kl. 11
Christianskirkjan: Niels Pauli Danielsen kl. 11
Norðoya Røktarheim: Niels Pauli Danielsen kl. 15
Haraldssund: Hans Eiler Hammer kl. 12
Havnar kirkja: Bjarni Bæk kl. 11
Fríðrikskirkjan: Liturgisk gudstænasta kl. 11 v/ luttøku av kirkjukórinum undir leiðslu av Mikal J. Heinesen
Húsavík: Jákup R. Hansen kl. 12
Elduvík: Uni Næs kl. 12
Eiði: Emil Olsen kl. 12
Norðskála: Emil Olsen kl. 15 (ongin gudstænast akl. 12)
Hvannasund: Elsa Funding kl. 12
Viðareiði: Elsa Funding kl. 17
Selatrað: Jógvan Fríðriksson kl. 12. Tey fýra syngja
Oyndarfjørður: Jógvan Fríðriksson kl. 18, altargongd
Sjóvar kirkja: Niels J. Nielsen kl. 12
Sørvágur: David Johannesen kl. 12, altargongd
Glyvrar: Meinhard Bjartalíð kl. 11
Øravík: Jónsvein Bech kl. 12.15, altargongd
Funningsfjørður: Uni Næs kl. 12.00

Páskaaftan
Glyvrar: Meinhard Bjartalíð kl. 20

Páskadag
Vesturkirkjan: Heri Joensen kl. 11. Kristiliga sangkórið syngur
Argja kirkja: Sverri Steinhólm kl. 11
Kirkjubøur: Bergur D. Joensen kl. 12
Norðradalur: Bergur D. Joensen kl. 14
Vágur: M. Telling kl. 11
Sumba: M. Telling kl. 18
Hvalba: Ólavur Rasmussen kl. 12
Hov: Ólavur Rasmussen kl. 14
Christianskirkjan: Niels Pauli Danielsen kl. 11
Húsar: Hans Eiler Hammer kl. 11, konfirmatión
Havnar kirkja: Hans J. Joensen, biskupur, kl. 11
Kaldbak: Sonja Klein kl. 12
Gøta: Martin R. Jacobsen kl. 12
Æðuvík: Martin R. Jacobsen kl. 17
Sandur: Jákup R. Hansen kl. 12, altargongd
Skopun: Jákup R. Hansen kl. 18, altargongd
Fuglafjørður: Uni Næs kl. 12
Funningsfjørður: Uni Næs kl. 16
Hellur: Uni Næs kl. 18
Eiði: kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa. Bjarni Bæk, dómpróstur, og Emil Olsen
Gjógv: Emil Olsen kl. 17
Funningur: Emil Olsen kl. 18.30
Elduvík: Uni Næs kl. 16.00
Eiði: Emil Olsen kl. 20
Viðareiði: Elsa Funding kl. 12
Skála: Jógvan Fríðriksson kl. 11. Barnakórið syngur
Oyndarfjørður: Jógvan Fríðriksson kl. 18. Ung spæla horntónleik
Miðvágur: David Johannesen kl. 12
Sandavágur: David Johannesen kl. 18
Rituvík: Meinhard Bjartalíð kl. 11
Tvøroyri: Jónsvein Bech kl. 11
Øravík: Jónsvein Bech kl. 12.15
Fámjin: Jónsvein Bech kl. 17
*Í Christianskirkjuni gongur talvan fyri KFUM og K*
*Á Húsum gongur talvan fyri Guds orðs boðan*
*Í Sørvágs kirkju gongur talvan fyri sunnudagsblaðið*

2. páskadag
Vesturkirkjan: Berg. D. Joensen kl. 11
Hestur: Heri Joensen kl. 12, altargongd
Leiti: M. Telling kl. 12
Hov: M. Telling kl. 14
Christianskirkjan: Niels Pauli Danielsen kl. 11, altargongd og barnagudstænasta, kl. 15 barnakór
Húsar: Hans Eiler Hammer kl. 11, altargongd
Mikladalur: Hans Eiler Hammer kl. 13, altargongd
Havnar kirkja: Bjarni Bæk kl. 11
Hvítanes: Sverri Steinhólm kl. 11
Nólsoy: Sonja Klein kl. 12
Fríðrikskirkjan: Martin R. Jacobsen kl. 11
Skálavík: Jákup R. Hansen kl. 12, altargongd
Skúvoy: Jákup R. Hansen kl. 18
Leirvík: Uni Næs kl. 12, familjugudstænasta
Norðskála: Emil Olsen, kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa
Hvannasund: Elsa Funding kl. 12
Sjóvar kirkja: Jógvan Fríðriksson kl. 12, Effata syngur
Bøur: David Johannesen kl. 12, altargongd
Glyvrar: Meinhard Bjartalíð kl. 11

**Páskastevnan í Ítróttarhøllini á Hálsi**
Skírisdag kl. 19.00: Møti.
Langafríggjadag: kl. 10.00: Morgunmøti, kl. 15.00 og kl. 19.00: Møti.
Leygardagin: kl. 19.00: Møti, kl. 22.00: Longsangskvøld.
Páskadag: kl. 10.00: Morgunmøti, kl. 15.00: Familjumøti, kl. 19.00: Møti og kl. 22.00: Gospeltiltak.
2. páskadag: kl. 10.00: Morgunmøti, og kl. 18.00: Møti.
Luttøka við Gordon Hickson úr Onglandi og Ole Henry Halleraker úr Norra. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Páskadag: kl. 8.00: Páskafrøi, kl. 9.00: Páskatónar á Landssjúkrahúsinum, kl. 11.00: Møti og kl. 18.00: Møti.
2. páskadag kl. 18.00: Møti.
Vit hava vitjan av majorunum Kari og Alf Tollisen.

**Katólska kirkjan**
Skírhósdag kl. 17 Messa, kl. 19-24 Tilbiðjan í Kerit.
Langafríggjadag kl. 11 Krossvegur, kl. 15 Pínslusøga Harrans. 1)
Páskaaftan kl. 22 Páskavøka
Páskadag kl. 11 Hámessa, eingin sunnudagsskúli.
2. Páskadag kl. 11 Messa.
1) Talvan gongur til frama fyri Heilaga Landið

**Ebenezer**
Skírisdag kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Langafríggjadag kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Páskadag: kl. 10.00: Breyðbróting, kl. 12.00: Sunnudagsskúli, kl. 18.00: Evangeliskt møti.
2. páskadag kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Langafríggjadag kl. 18.00: Møti v/ Axel Jacobsen.
Páskadag kl. 18.00: Møti við Bergur Debes Joensen.
2. páskadag kl. 18.00: Møti v/ Niels Juul Olsen, Gittit syngur.
Týskvøldið 2. apríl kl. 20.00: Bíbliutími, Lukas kap. 6, vers 1-19.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00: Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Bardagin miklið komin at enda. Kl. 11.00: Gudstænasta (sjónvarpsupptøka), J.V. Danielsen.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Ræðist ikki! Tit leita eftir Jesusi úr Nasaret, hinum krossfesta; hann er risin upp, hann er ikki her!*
*Mark. 16,6*

Vit bera okkara deyðu út í kirkjugarðin. Og mangan eru vit við at halda, nú er alt liðugt. Eitt lív er endað, og so hendir ikki meir. Her er tað, at kristna trúgvin sigur, at deyðans makt ikki skal megna at taka hitt æviga lívið frá okkum. Trúgvin sigur, at okkara deyðu skulu saman við okkum rísa upp og liva um ævir. Yvir kirkjugarðinum hvílir ein endaleysur friður. Guds friður hvílir yvir teimum deyðu. Og Harrans dag skulu tey rísa upp. Tí er deyðin fyri okkum ikki bara dapur og myrkur. Hann merkir, at vit hvíla í moldini til Harrans afturkomu, hin stóra páskamorgun. Vit liva øll eitt avmarkað lív í heiminum. Men fyri okkum er lívið ævigt og varir yvir um gravarbakkan. Vit skulu liva hóast deyða. Jesus er upprisin. Og tað merkir, at nú er vón um lív. Ja, vit eiga hetta lív longu nú í og við trúnni. Og hetta lív er uttan enda. Uppreisnartrúgvin sigur, at vit skulu liva, hóast vit skulu leggjast í moldina. Vit skulu liva, hóast vit, sum eru av mold, skulu verða at md. Hetta er ein ótrúligur boðskapur. Hesin boðskapur ger okkum glað, glað hóast mótburð, líðing og deyða. Jesus er upprisin, sanniliga er hann upprisin! At vilja trúgva hesum er at liva – tað er at liva hóast deyða. Hesin boðskapur fyllir okkara tómrúm og okkara sorg og sakn við gleði og takksemi. Vit, tú og eg, eru ávegis til lívið. Hetta æviga lívið vann Jesus tær páskamorgun. Lat hesa trúgv leiða teg gjøgnum lívið og deyðan.

Amen.

**David Johannesen**



Bústevnan Hús & Innbúgv

3., 4. og 5. mai verður Ítróttarhøllin í Runavík karmur um størstu messu nakrantíð innan føroyska byggimarknaðin og innbúgv.

Skalt tú byggja nýtt ella umvæla gamalt, so er vert at leggja leiðina framvið í Runavík og fáa allskyns hugskot og tilboð heim við til húsa aftur.

Allar førandi fyritøkur sum hava eitthvørt við føroyska byggimarknaðin ella innbúgv at gera, verða umboðaðar.

Opið er allar dagarnar frá kl. 10.00 - 20.00
Ókeypis atgongd.
Børn bert atgongd saman við vaksnum.



Høvuðsstuðul hjá Hús & Innbúgv
FØROYA SPARIKASSI

HÚS & INNBÚGV
Postbox 169 • FO-620 Runavík
Tel 44 91 91 /45 63 98 Fax 44 86 35
Fartel 22 29 82 / 26 15 44
Email nhj@post.olivant.fo

Ert tú blástur?



REPROZ